# Borgarstjóri styrkti sína støðu

**- Eg eri ikki nøgd við, at vit bert fingu tvey umboð av sjey í bygdaráðið. Eg dugi heldur ikki at síggja, at úrslitið hevði verið øðrvísi, um vit høvdu kvinnur á almenna listanum umframt lista B, sum bara var mannaður við kvinnum, sigur Jansy Olsen, sum er forkvinna í Tofta Kvinnufelag**


*Valluttøkan til kommunuvalið í Nes kommunu var 84,8%*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

KOMMUNUVAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tveir listar vóru til kommunuvalið í Nes kommunu hesaferð, listi A, sum varð gjørdur á almennum fundi í Tofta skúla – og listi B, sum var ein reinur kvinnulisti.

Tá leið móti middegi, var líkt til, at undirtøkan fyri valinum fór at vera heldur minni hesaferð enn á valinum fyri fýra árum síðan. Men sum seinnaparturin leið, kom rættilig ferð á, at nógv fólk streymaðu í hølini at velja.

Tilsamans 894 fólk høvdu valrætt í Nes kommunu, og tá hølini lótu aftur, høvdu 758 fólk greitt avkvøðu, sum svarar til 84,8%.

## Símun gott val

Listi A, har eitt nú sitandi borgarstjóri, Símun Johannesen, Petur Jacob Petersen (Dakku) og Súni í Hjøllum, vóru á, fekk tilsamans 525 atkvøður, meðan listi B, sum bara var mannaður við kvinnum, fekk 231 atkvøður

Úrslitið gjørdist, at listi A fekk fimm umboð og listi B tvey.

Tey, sum vórðu vald á lista A, vóru Símun Johannesen (94), Petur Jacob Petersen (81), Súni í Hjøllum (77), Jóhannus Danielsen (72) og Jákup Martin Kjeld (58).

Á lista B vórðu Elin á Torkilsheyggi (61) og Sunfríð Jacobsen (47) valdar.

Sitandi borgarstjóri hevði soleiðis eitt rættiliga gott val, og tá havt verður í huga, at Jonna Joensen, sum býr saman við beiggja hansara, eisini var á kvinnulistanum, var valið ikki minni gott.

Petur Jacob Petersen hevði eisini eitt gott val, eins og Súni í Hjøllum, sum leingi hevur verið uppi í kommunalpolitikki og serliga hevur sett síni spor í teknisku nevnd, eisini varð afturvaldur.

## Misnøgdar kvinnur

Meðan upptelingin fór fram í valhølunum á Toftum, vóru nakrar kvinnur inni á gólvinum, og millum hesar var Jansy Olsen, sum er ein stríðkvinna fyri øktum leikluti hjá kvinnum. Jansy var ikki sjálv á lista B, men eingin ivi er um, at hon hevur havt ein virknan leiklut uppundir valið.

Jansy segði seg ikki vera nøgda við kommunuvalið, har talið av kvinnum gjørdist tvær av sjey bygdaráðslimum.

- Nei, eg eri ikki nøgd, men dugi heldur ikki at síggja, at úrslitið hevði verið øðrvísi, um vit høvdu kvinnur á almenna listanum umframt lista B, sum bara varð mannaður við kvinnum.

## Tóku seg av

Tá almenni listin varð gjørdur í skúlanum á Toftum fyri valið, vóru umleið 70 fólk á fundi, og her vórðu fýra kvinnur atkvøddar inn á almenna listan.

Men, sum dagarnir gingu, gjørdu kvinnurnar, sum vóru komnar á henda listan, av at taka seg av aftur og skipa sín egna lista.

Soleiðis var eingin kvinna á almenna listanum, tá samanumkom.

Jansy dugir tó ikki at síggja, at tað hevði broytt nakað upp á kvinnuligu umboðanina, um fýra kvinnur vóru á almenna listanum – og at listi B var ein reinur kvinnulisti.

- Nei, tað trúgvi eg ikki hevði gjørt tann stóra munin, sigur ein heldur vónsvikin Jansy Olsen.


*Nógvar hugnaligar løtur eru í valhølunum ein langan valdag, og viðhvørt rungar látur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*


*Sitandi borgarstjóri í Nes kommunu, Símun Johannesen, fekk 94 atkvøður á kommunuvalinum, sum má sigast at vera eitt rættiliga gott val*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*